SAGA drúgvar royndir á djúpum vatni:

Væl fyri at vera við í oljuleiting við Føroyar



Saga hevur verið slóðbrótari á djúpum vatni í Norðsjónum og ynskir tí eisini at vera við á djúpum vatni við Føroyar. Felagið er væl brynjað út til hesa leiting og vónandi eisini framleiðslu av føroyskari olju. Felagið er í løtuni í samráðingum við onnur oljufelag um samstarv

JAN MÜLLER

Føroyski landgrunnurin sær sera lovandi út, tá tað snýr seg um møguleikarnar at finna olju og gass.

Hetta sigur Terje Hagevang, leitingarstjóri hjá norska oljufelagnum Saga.

Hann hevur júst vitjað í Føroyum saman við fleiri øðrum umboðum fyri felagið.

Á tíðindafundi á Hotel Hafnia nú um dagarnar greiddi altjóða stjórin hjá SAGA, Torstein Sanness frá søgu og virki felagsins.

Hann váttaði tíðindum í útlendskum bløðum um, at Saga er við at pakka síni kuffert í bæði Indonesia og í danska partinum av Norðsjónum fyri at senda tey víðari til Føroya.

Til Føroya við royndum og vitan

Saga sær stórar møguleikar at vera við í oljuleitingini við Føroyar. Og hetta byggir ikki minst á tá vitan og tær royndir, sum felagið longu hevur frá økjum, sum eru Føroyum meinlík.

Og at grundgeva fyri hesum er Terje Hagevang maðurin hjá Saga Petroleum.

Hann vísir á, at teir hjá Saga eru áhugaðir fyri at vera við í 1. lisensumfarinum á føroyskum øki og tað sum operatørur.

Við teimum royndum vit hava sum operatørur á djúpum vatni í Norðsjónum, so halda vit, at henda uppgáva er rættiliga natúrlig fyri okkum í føroyskum øki. Í løtuni hava vit samráðingar við eitt ella tvey oljufeløg, harímillum okkurt stórt og vælkent oljufelag um at vera í einum bólki saman við okkum, sigur Terje Hagevang.

Fyrstir á djúpum

Hann vísir á, at Saga var eitt tað fyrsta felagið, sum vágaði sær út á djúpri vatn, tá oljuvirksemið av álvara tók seg upp í Norðsjónum. Og soleiðis hevur tað verið síðani. Hvørja ferð vinnan hevur torkað seg longur út á djúpt vatn, hevur Saga ligið fremst. So var, tá oljuvinnan fór út á 200 metrar, út á 300 metrar, út á 400 metrar og nú aftur, tá farið verður at bora á Vøringsflettanum út fyri Miðnoreg á ikki minni enn 1400 metra dýpi.

Nú tað verður farið at bora á kanska somu dýpum á føroyskum øki vil Saga fegið vera við. Terje Hagevang sigur, at vitanin teir hava í løtuni sigur teimum sonikið, at tað eru økini, sum liggja millum 500 og 1000 metrar, sum eru mest lovandi.

Tað er so eisini fyrst nú at tøknifrøðin til at arbeiða á so stórum dýpi er tilstaðar.

Umrøða framleiðsluslag

Saga hugsar langt. Teir umrøða í løtuni eisini, hvat slag av framleiðsluútbúnað teir skulu brúka í Føroyum, tá teir vónandi hava funnið olju.

Og aftur her kunnu royndirnar hjá Saga í Norðsjónum koma væl við. Her verður ikki minst hugsað um flótandi framleiðslupallin Snorre, sum fert er festur í havbotninum við veirum.

Tað er ikki óhugsandi, at tað verður ein nútímansgjørdur „Snorrelíknandi" pallur, sum fer at taka oljuna upp á føroyskum øki, sigur Terje Hagevang, sum heldur hesa loysnina verða sera væleignaða til føroyska økið. Pallurin verður nú útbygdur, soleiðis at hann í komandi árum verður heimsins største flótandi framleiðslueind.

Aðrir møguleikar, sum Saga fólkini eisini umhugsa, eru framleiðsluskip av tí slagnum, sum BP hevur bygt til Atlantsmótið.

Partur av sama øki

Ein av orsøkunum til, at Saga sær so stórar møguleikar á føroyskum øki er tann sannroynd, at Føroyar eru partur av einum jarðfrøðiligum øki, sum fevnir um Vøringhasláttan út fyri Miðnoreg, Føroyar, leiðirnar vestan fyri Hetland, Rockallhasléttan og so leiðirnar vestan fyri Ísland.

Tað er so ikki bert Saga, sum arbeiðir út frá hesi sannroynd ella teoriunum um, at alt umrødda økið líkist og kann goyma olju. Eitt nú hevur AMG-samtakið við Statoil á odda nið vist arbeitt út frá teoriini um eitt „Western Slope", eina vesturhelling, har olja og gass finst á øllum Atlantsmótinum.

Bjóða uppá Santa Fe

So mikið stóra áherðslu leggur Saga á leitingina í hesum stóra økinum, at felagið hevur boðið nærum 10 milliardir krónur fyri oljufelagið Santa Fe. Slíkt keyp vil geva Saga vitan og møguleikar í øðrum pørtum av Atlantsmótinum. Við at vera við í leitingini á allari hellingini kann Saga saman við sínum samstarvsfeløgum brúka vitan frá einum øki í einum øðrum ostr.

Torstein Sanness, stjóri fyri altjóða kanningum og framleiðslu hjá Saga sigur, at skal tað loysa seg at gera

Fyra av Sagafólkunum, sum vitjaðu í Føroyum herfyri við altjóða forsetanum Torstein Sanness á odda. Teir skulu her hitta løgmann. Mynd kalmar

flógur í hesum nýggja økinum, so er neyðugt at finna stórar oljukeldur.

Hesar skulu vera á støðd við Foinaven vestan fyri Hetland ella kanska enn størri. At Saga er við í leitingini kemst so eisini nettup av, at teir trúgva, at her finnast stórar oljukeldur.

okkum nakað gott í kjalarvørrinum á eini oljuvinnu. Men hann vónar inniliga, at vit megna at takla hesa nýggju støðu, og til tess at verða so væl fyrireikaður sum gjørligt. Er tú ikki fyrireikaður, so verður farið at vera eksperimentir, har hvør maður roynir sum harðast, og tá fara nógv at detta niður ímillum. Teir, sum so royna sum harðast, kunnu kanska fáa eitt øgiligt virksemi í einum stað og fullkomiliga knúsa tað, sum er frammanundan.

Mugu ikki gerast staturin

Vit spurdu Páula Einarsson, hvat slag av oljufeløgum hann helst sær í Føroyum, t.d. stór ella minni?

Tað er ringt at svara uppá. Um teir stóru oljugigantarnir koma henda vegin, so vóni eg ikki, at teir verða staturin í framtíðini, at teir koma at stýra hesum, sum teir hava gjørt í øðrum londum. Hetta er tað vit mugu ansa eftir.

Páuli Einarsson hevur annars gott álit á tí komandi oljuløggávuni, at hon skal forða fyri slíkum. Sama løggáva eigur annars at vera eins fyri øll.

Vit spurdu, hvussu nóg oljufeløg ella samtøk hann heldur eiga at sleppa at bora við Føroyar?

Millum trý og seks feløg ella bólkar. Í fyrstu fasu trúgvi eg ikki, at ov nógv verður farið leyst í senn. Velja øll sama øki, so tókni eg ikki við, at tað verða so nógv oljufeløg, sum fara at bora í fyrstu atløgu.

Føroya Oljuídnaður stóran týdning

Nú er felagið Føroya Oljuídnaður rættiliga ungt felag og vit spurdu formannin, hvat er komið burtur úr higartil.

Hann er fyri tað fyrsta sera fegin um tær fráboðanir, sum FOI hevur tikið stig til. Teir hava so eisini fingið nakað av upplýsingum út til limirnar, tó kanska enn ikki so nógv skrivligt tilfar, men her hava fjølmiðlarnir verið góðir at upplýsa.

Føroya Oljuídnaður er kent millum øll oljufeløgini og tað vísir seg meira og meira, at FOI er vorðið samskipari av nógvum, sum hevur samband við hesa nýggju vinnu.

Vit virka í dag sum eitt slag av sentrali fyri bæði okkara egna vinnulív og so oljufeløgini. Skulu hesir báðir tættir hava samband við hvør annan, so verður tað í størri og størri mun gjørt gjøgnum Føroya Oljuídnað.

Páuli Einarsson heldur tí eisini, at FOI er vorðið góð tikið av olju- og kontraktorfeløgum, og tað er av stórum týdningi fyri føroyskt vinnulív.

Tað kann hava stóran týdning fyri føroyingar, sum vilja hava samvinnu við útlendsk feløg í oljuvinnuni ella persónar, at kunna vísa til FOI. Men eisini ALS hevur týðandi leiklut í hesum. Her serliga tá talan er um rekruttering.

Kemur tilmeldi frá einum av hesum stovnum, so er størri møguleiki fyri, at tað verður lisið.

Páuli Einarson sigur at enda, at FOI hevur ikki nógvar pengar at arbeiða við. Tað hevði verið ynskiligt, at teir høvdu meira at arbeiða við, soleiðis at virksemi kundi verið meiri og útbygt.